# Ein merkisdagur fyri føroyska flogvinnu

**FLOGVINNA Í gjár bleiv fyrsta skotið latið av í leingingini av flogvøllinum í Vágum. Hetta arbeiði kann úrslita í, at tað verður bíligari at flúgva til og úr Føroyum**

Barbara Holm

– Hetta er ein merkisdagur fyri føroysku flogvinnuna, segði Johan Dahl, eftir at fyrsta skotið varð latið av.

Leingingin av flogvøllinum í Vágum er nú byrjað, og arbeitt verður fram til seinna endan av 2011, tá ið arbeiði væntast at verða liðugt.



*Hetta er ein merkisdagur fyri føroysku flogvinnuna, segði Johan Dahl, eftir at fyrsta skotið varð latið av*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Í almennari móttøku á flogvøllinum í gjár, vóru fleiri hundrað fólk komin saman at hátíðarhalda fyrsta arbeiðsdagin í verkætlanini. Magni Arge, stjóri í Atlantsflog, var ikki sørt fegin um dagin, sum hann metir verða kærkomnan.

– Tað er fyri neyðini, at vit umsíðir bøta um samferðslukervi til flogferðsluna, og tað kemur avgjørt at merkjast væl hjá føroyingum, tá ið arbeiði er liðugt, sigur Magni Arge, stjóri í Atlantsflog.



Nýggj og størri flogfør kunnu takast í nýtslu, tá ið flogvøllurin er longdur.

– Av tí, at vit kunnu nýta størri flogfør, tá ið arbeiði er liðugt, kann eisini hugsast, at tað verður bíligari at ferðast til og úr Føroyum, greiður Magni Arge frá.

Arbeiði verður liðugt í seinna endanum av 2011, og tá verður eisini tað sokallaða AirBus flogfarið tikið í nýtslu.

barbara@sosialurin.fo

# »Fáa vit nakra útbúgving?«

**ÚTBÚGVING Ungdómar í Føroyum stúra fyri at byrja á Fróðskaparsetrinum, um politiski viljin broytist, og útbúgvingin verður niðurløgd áðrenn næmingarnir hava lokið útbúgvingina**

Barbara Holm

Í fjør vóru eingir næmingar tiknir inn á søgu og samfelagsdeildina á Fróðskaparsetrinum. Orsøkin var, at Fróðskaparsetri ikki hevði ráð til at taka næmingar inn, og eingin eykajáttan varð latin frá løgtingsins síðu.

Hetta hevur ávirkað hugburðin hjá føroyskum ungdómi, og kom hetta týðiliga til sjóndar á kunnandi fundi í Miðlahúsinum í gjárkvøldið.



*Fitt av áhoyrarum vóru í Miðlahúsinum*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Umboð frá søgu og samfelagsdeildini greiddi frá teimum útbúgvingunum, sum deildin í ár bjóðar út til føroyskan ungdóm – søgu, stjórnmálafrøði og samfelagsvísind. Og tað gjørdist skjótt greitt, at ungu fólkini stúrdu fyri, at tey fóru at byrja á setrinum, men ikki megna at fullføra útbúgvingina.

Men hesum vissaði rektarin á Fróðskaparsetrinum, Jóan Pauli Joensen, fyri.

– Øll, sum byrja uppá eina útbúgving á Fróðskaparsetrinum, fáa møguleikan at gera seg lidnan við lesnaðin, sigur hann.

### Fleiri rústúrar

Sum verða man, var eisini áhugi fyri at vita, hvussu sosialalívið á Fróðskaparsetrinum var. Ein luttakari á fundinum spurdi seg fyri, hvussu umstøðurnar eftir skúlatíð vóru, og um skúlin gjørdi nakað sosialt fyri at lokka ungdómin til at velja Fróðskaparsetri, og ikki universitet uttanlands.

– Vit ætla okkum í framtíðini at gera meira fyri at bøta um sosiala partin av skúlagongdini. Vit taka í ár 200 næmingar inn, og fara at byrja skúlaárið við einum rústúri, greiddi Rúna Hjelm, umboð fyri Fróðskaparsetri frá.

### Nýggjar útbúgvingar í framtíðini

Fróðskaparsetri hevur fleiri nýggjar útbúgvingar í ár. Nevnast kann samfelagsvísind á søgu og samfelagsdeildini, og KT-verkfrøði á náttúruvísindadeildini.

Jóan Pauli Joensen væntar, at framtíðin fer at lata upp fyri nýggjum útbúgvingum, sum føroyska samfelagið hevur tørv á.

– Vit mugu bjóða tær útbúgvingar, sum samfelagnum tørvar. Í framtíðini kunnu vit hugsa okkum at bjóða eina journalistútbúgving, og aðrar øðrvísi útbúgvingar, sigur Jóan Pauli Joensen, rektari.

Rektari vil ikki siga, nær hann væntar, at aðrar útbúgvingar verða settar á stovn. Í ár kann so staðfestast, at 200 næmingar sleppa inn á Fróðskaparsetri, og meira kunning um hesar útbúgvingar fæst á heimasíðuni setur.fo.

barbara@sosialurin.fo

# Sinnisbati hevur aðalfund leygardagin

Í samband við aðalfundin hjá Sinnisbata leygardagin 8. mai verða hesi mál umrødd:

Súsanna Olsen, stjórnmálafrøðingur (cand.scient.pol.) og dagligur leiðari á Daglonini á psykiatriska deplinum, fer at umrøða evnið »at koma fyri seg« (recovery)

Tórmóður Stórá, serlækni í psykiatri fer at tala um neyðugar broytingar á sálarliga økinum og umrøða nýggjar hugsanir innan sjúkrahúsøkið, soleiðis at Landssjúkrahúsið hýsir bæði likamliga- og sálarliga sjúkum.

Felagið Sinnisbati ynskir allarbestu umstøður fyri sálarliga økið. Kærkomið hevði verið um ein góð og neyðug loysn varð framd skjótast gjørligt.

Kjakast hevur verið um álitið um heildarpsykiatri síðani 2002.

Ein sálarheilsuætlan má gerast fyri allar Føroyar, soleiðis at fólkið, sum býr í hesum landi kann hava so góð sálarheilsukor, sum gjørligt, leyst av vanahugsanum, sum politikkarar okkara mangan hava.

Tøgn politikkaranna viðvíkjandi sálarsjúkum fólki má halda uppat.

Okkara fólkavaldu taka størri ábyrgd av hesum øki.

Sinnisbati leggur upp til nýggjar hugsanir og fremjan á bæði sosiala økinum og sjúkrahúsøkinum.

– Øll eru vælkomin til nevndu fyrilestrar í samband við aðalfundin hjá Sinnisbata leygardagin 8. mai kl. 14 á landsbókasavninum, J. C. Svabosgøta 16 í Havn, sigur Soffi Egholm, forkvinna í Sinnisbata.